# Team hevur keypt Dekostovuna

**Hósmorgunin varð sáttmáli undirskrivaður, soleiðis at rakstur, amboð og starvsfólk hjá Dekostovuni verða yvirtikin av Team85**

KEYP
*Jákup Mørk*

- Hetta er ein liður í eini strategiskari menning av fyritøkuni, staðfestir Hjalgrim Samuelsen, stjóri á Team85, tá vit fregnast um keypið, sum nú er gjørt.

- Verkstovan hevur í fleiri ár verið eitt av økjunum, har Team hevur lagt nógva orku. Ein av stóru kappingarneytunum í hesum hevur verið Dekostovan, og tá hesin møguleikin stakk seg upp, var tað avgjørt nakað, sum var áhugavert fyri okkum, sigur hann.

Saman við Dekostovuni hevur Team 85 í fleiri ár verið ein av fremstu føroysku fyritøkunum innan skelting, stórprent, sølubásar v.m., og stjórin tykist avgjørt rokna við, at keypið av Dekostovuni verður eitt munagott ískoyti til raksturin av fyritøkuni í so máta.

Hann vil ikki upplýsa, hvør keypsupphæddin er. Men keypið inniber, at allur aktivitetur, skuldarar, starvsfólk v.m. verður flutt úr Dekostovuni í Team85. Hartil er eisini staðfest, at verandi eigarar av Dekostovuni halda fram í starvi hjá Team85.

# Nú skal eg bara arbeiða

*Eftir 15 ár sum stjóri á egnari fyritøku, skal Oddbjørg Højgaard nú teljast millum vanligu fólkini á gólvinum. Dekostovan er seld til Team85, har Oddbjørg tó enn fer at starvast*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Oddbjørg Højgaard, sum fyri 15 árum síðani setti Dekostovuna á stovn, sigur, at tað er við eini blanding av gleði og sorgblídni, at hon nú hevur selt fyritøkuna til Team85**

SØLA
*Jákup Mørk*

Tá avgerðin um at selja Dekostovuna varð tikin, var hetta ikki nakað, sum varð gjørt í óðum verki.

- Hetta er nakað, sum vit hava hugsað um í eina tíð, sigur Oddbjørg Højgaard, sum í 1993 fór undir virksemið á Dekostovuni.

- Men tað er sjálvandi við ávísum sorgblídni, at slíkt verður gjørt. Vit bæði, Hjalmar (sambúgvin hjá Oddbjørg) hava rikið virkið í 15 ár, og sjálv eru vit eisini væl nøgd við gongdina, sum hevur verið.

- Hinvegin, so setir tað eisini síni krøv, tá tú rekur egið virkið. Saman við tí stuttliga partinum er jú so nógv annað, sum eisini skal gerast. Og fyri at siga tað akkurát, sum tað er, so er tann fyrisitingarligi parturin av hesum ikki júst tað, sum eg tími best at nýta mína orku til.

*So tú gleðir teg kanska til »bara« at sleppa at arbeiða aftur?*

- Tað kanst tú gott siga. Nú kann eg arbeiða sum eitt vanligt starvsfólk. Og ikki minst, so sleppur tú undan at hugsa um virkið 24 tímar um samdøgrið. Vónandi er tað nakað, sum kann geva okkum eitt slag av frælsi, sum vit ikki hava havt, og tað er nakað, sum eg gleði meg til, sigur hon, áðrenn hon stórflennandi leggur afturat.

- Og makka tey ikki rætt. So kann eg jú bara siga upp!

# - Vit hava brúk

**Sum skilst á skrivstovuni hjá P/F Nærabergi í Klaksvík, hevur higartil gingist eftir ætlan umborð á flaggskipinum, Atlantic Navigator**



ATLANTIC NAVIGATOR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein føroyingur og tveir norðmenn standa aftanfyri driftina av P/F Nærabergi, ið er felagið, sum nú rekur flaggskipið, Atlantic Navigator.

Føroyingurin er Hans Arni Bertholdsen.

Hann sigur, at teir vanliga eru tveir og tríggir mans á skrivstovuni um dagarnar.

Men hvussu hevur so gingist hjá Atlantic Navigator, síðan teir loystu í Ánunum seinnapartin mánadagin?

**Triðja hálið**

Í samrøðu við Sosialin søgdu skiparanir, áðrenn loyst varð mánadagin, at ætlanin var at fara eystureftir, eystur ímóti markinum til norskan sjógv, tí har høvdu føroysk skip hampiligan fiskiskap eftir svartkjafti.

Hans Arni heldur, at skipið hevur roynt norðrari á, men nú er minni svartkjaftur at fáa.

- Veðrið hevur verið vánaligt á leiðini, og uppundir illveður plagar svartkjafturin at vera verri at fáa fatur á í stórum nøgdum.

Tá ið Sosialurin frætti úr Klaksvík í morgun, visti Hans Arni at siga, at Atlantic Navigator hevur havt tvey hál og hevði trolið úti á triðja sinni í føroyskum sjógvi.

Tey bæði fyrru hálini fingu teir eini 50 tons í hvørjum háli.

Tá ið havt verður í huga, at eitt so stórt skip kann arbeiða eini 700 tons í ráfiski um samdøgnið, er hetta ikki nøkur stór nøgd.

- Men hesi hálini eru

# Bjóða fólki at halda jólaafta

**- Er tað onkur, sum kundi hugsað sær at sloppið við bili til jólaaftanshaldið í KFUK, eru tey vælkomin at siga frá – og syrgt verður fyri, at øll koma trygt heimaftur, sigur Sonja Klein, prestur, sum aftur í ár fyrireikar jólaborð í KFUK**

JÓLABORÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað eru ikki øll, sum hava møguleikan at vera saman við sínum kæru á jólum, og nógvar ymiskar orsøkir kunnu vera til tað. Í staðin fyri at sita einsamallur, er gott at hava onkran at vera saman við jólaaftan.

Í KFUK í Havn hevur jólaaftan verið hildin á hvørjum ári síðan 1993, og soleiðis verður eisini í ár.

Seinastu árini hava Sonja Klein, prestur og maður hennara, Holger Arnbjerg, saman við Jørgeni Dahl, skipað fyri hesum tiltaki, sum plagar at vera sera hugnaligt.

Og aftur í ár taka hesi trýstig til jólaaftanshaldið í KFUK.

**Sum vanligt**

Sonja Klein sigur, at jólaaftan í KFUK verður hildin á sama hátt sum hjá teimum flestu.

- Klokkan 19 møta fólk til búgvið borð, og tey fáa jóladøgurða við øllum tí, sum plagar at hoyra til. Oman á er rís alamande við mandlugávu.

Hon sigur, at jólaevangeliið verður lisið, og jólasálmar verða sungnir.

- Sjálvandi verður eisini jólatræ at dansa um og øll, sum við eru, fáa persónligar gávur.

Sonja sigur, at eini 25 fólk plaga at halda jól saman í KFUK.

**Sigið frá**

- Er tað onkur, sum kundi hugsað sær at sloppið við